## Umsóknarblað

Umsóknarblað til tænastu, er á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

Í umsókníni gevur borgarin loyvi til eitt sjálvvirkandi gjald av tænastuni.

Søkt verður á Vanganum, ella við at senda umsóknarblað til:


**Heilsu- og umsorganartænastuna**
Postboks 32 • FO-110 Tórshavn





Februar 2024

TÓRSHAVNAR KOMMUNA


**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo


**UPPLATINGARTÍÐIR**

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt

UMSORGAN OG RØKT

# Matartænasta

– døgurði heim til fólkapensjonistar



## Miðvís umsorgan

Kjarnuuppgávan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni er við miðvísari umsorgan, tænastu, heimatænastu, heilsu- og sjúkrarøkt at stuðla borgaran soleiðis, at hann gerst virkin og vakin alt lívið.

Heilsurøkt og umsorgan er eitt týdningarmikið málsøki hjá Tórshavnar kommunu, sum vil ganga á odda og veita skjóta og góða heildartænastu.



UMSORGAN OG RØKT

# Matartænasta

– døgurði heim til fólkapensjonistar

**Heilsu- og umsorganartænastan í Tórshavnar kommunu veitir mattænastu, í styttri ella longri tíðarskeið, til ávísar fólkapensjonistar, ið búgva í egnum heimi.**

Í mattænastuni hjá heilsu- og umsorganartænastuni, fáa tygum góðan kost, ið er av alstórum týdningi fyri heilsu og vælveru. Endamálið er at tryggja gott føðslustøði og stimbra vælveruna og lívsgóðskuna hjá borgaranum.

## Hvør kann fáa mattænastu

Fyrst og fremst heimabúgvandi fólkapensjonistar, ið ikki megna at gera døgurða.

Í serligum føri kann tænastan veitast borgarum undir 67, sum búgva í egnum heimi.

Avgerð um at veita hesa tænastu verður gjørd av einum visitatori. Metingin byggir á eina fakliga heildarmeting

## Útkoyring

Døgurðin verður koyrdur heim til tygara allar yrkadagar. Tygum ráða yvir hvussu nógvar dagar um vikuna tygum vilja hava døgurða. Og um tygum ynskja heilan ella trýkvartan verður.

Neyðugt er at bilførarin fær latið tygum matin, og týdningarmikið er at maturin kemur í kuldaskáp beinanveg.

Eru tygum ikki inni, tá døgurðin kemur, kann útberarin seta seg í samband við avvarðandi.

## Samband

teldupost mattænastan@torshavn.fo
telefon : +298 226730 millum kl. 7.00 og 10.00

Um tygum ynskja samband við køkin, ber til at ringja ella skriva til omanfyristandandi.

Vilja tygum geva avboð, vinarliga sigið frá tríggar yrkadagar undan, og somuleiðis tá meldað verður til aftur.

**Talan er um serstaka tænastu, og skal borgarin søkja um tænastunuveitingina.**

## Serligur kostur

Tørvar tygum serligan kost, vegna sjúku ella annað, er neyðugt við læknaváttan.

**Ein kann fáa mat hvønn dag ella eftir tørvi. Tað kann vera eitt styttri tíðarskeið ella yvir longri tíð.**

## Matarskrá

Tygum fáa sendandi matskrá 2. hvørja viku.

## Kostnaður og gjaldstreytir

Heilur (1/1) døgurði kostar 53 kr.
Tríkvart (3/4) døgurði kostar 47 kr.

Gjaldast kann bert umvegis peningastovn, har tygum lata peningastovnin sjálvvirkandi gjalda upphæddina fyri mánaðarligu uppgerðina.

## Døgurðin skal hitast

Døgurðin er liðugur, men kaldur og skal standa í kuldaskápi til hann skal hitast og etast. Hita døgurðan, ið er merktur REYTT, við 150 stigum í 45 min., í ílatinum við lokinum á. Ella í mikroovni 3-5 min.

Matur merktur BLÁTT skal ikki hitast, men etast kaldur.